

Tit ringja — vit skriva

Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!
Telefon 11820 - Telefax 14720




tíðindablaðið **sosialurin**



Lýsingar


Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
Telefon 11820 - Telefax 14720

Millumbylgjusendarin Røstin




Hann hoyrist ikki millum bylgjurnar

veðrið




Djúpa lágtrýstið skamt úr Føroyum ferðast í ein landnyrðing og nýggj lágtrýst yvir Atlantshavinum ferðast móti Føroyum og viðari eysturyvir.

Hósdagin:



Hvassur vindur til skrið, kanska stormur, av vestri og útnyrðingi og kavaælingur, men eisini solarglottar. Móti kvøldi makar hann vindin aftur. Hitin um dagin uml. á frostmarkinum, um nattina niður imoti einum tveimum kuldastigum.

Friggjadagin:



Hann friskar vindin aftur upp í skrið av landsynningi og eystri, skýggjað loft og ælaveður, lutvist sum kavaælingur, men út á dagin hækkar hann upp í norðan við minni avfalli og betri sýni, men kortini hendinga kavaæl. Hitin at byrja við uml. á frostmarkinum, men seinni millum 1 og 5 kuldastig.

kelda: Danmarks Meteorologisk Institut

Óli í Áarstovu



Landsstýrið krevur at samráðingarnar hjá Atlantsflog skulu ganga við flúgvandi ferð.

— * —

Eg visti ikki at Fredrik lá so leingi á.

— * —

Um man kann hava kenning í 55 dagar, eftir at hava drukkkið Fredrik, haldi eg at tað er óneyðugt at innflyta rúsdrekka.

— * —

Man nakað vera galið úti í Tinganesi, nú teir eru farnir at seta fólk eftir innstilling?

— * —

Der Sturmer og Dagblaðið somu typografi — tilvild?

— * —

Brandnýtt Dagblað

— * —

Nógvur roykur og eingin grind

— * —

Tað eru nógv konufólk sum umhugsa ikki at gjalda sjónvarpsgjald, nú Jógvan Jespersen ikki verður at siggja á skerminum longur.

— * —



Vestfalskyrrindi

4. mars: Fyrra kvarter.
11. mars: Fullmáni.

	Suðuroyarfirði		Vestmannasundi		Nólsoyarfirði		Haraldssundi/Lorviksfirði		Skúvoyarfirði/Skopunarfirði		Hestfirði	
Dagur	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.	fp.	sp.
8. mar	0425	1648	0625	1848	0240	1503	0440	1703	0325	1548	0340	1603
9. mar	0512	1733	0712	1933	0327	1548	0527	1748	0412	1633	0427	1648